**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 7 |
| Tíð: | 07-07-2022 klokkan 13 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Ingigerð á Trøðni, limur.

**Fundarskrá:**

1. Góðtaka rokningina frá Landsfelag Pensjónista fyri dagin í Norðurlandahúsinum
2. Taka samanum hvat er avgjørt viðv. Eldradagin í okt. 2022, har evnið er UMHVØRVIÐ
3. Ymiskt

AD 1 Góðtaka rokningina frá Landsfelag Pensjónista fyri dagin í Norðurlandahúsinum

Útreiðslurnar hjá Landsfelag Penjónista í Norðurlandahúsininum gjørdust hægri enn væntað, tí nógv fleiri fólk møttu til dagin enn væntað. Tí gjørdist okkara partur av útreiðslunum hægri, enn vit mettu. Nevndi mælti einmælt til at góðkenna eykakostnaðin, og hetta verður boðað TK frá.

AD 2 Taka samanum hvat er avgjørt viðv. Eldradagin í okt. 2022, har evnið er UMHVØRVIÐ

Nógv nøvn hava verið uppi at venda um Eldradagin. Brynhild Thomsen, Sway, Marius Rein, Katrin Petersen, Bill Justinussen, Høgni Djurhuus, Roar Olsen, Bjørg Dam, Ólavur á Váli Olsen, Gunhild Dahl Niclassen, Óluva Zachariassen og mong onnur.

Ein fyribils skrá fyri Eldradagin í oktober varð gjørd, og vit fara at seta okkum í samband við tey, vit fara at heita á um at luttaka. Vit fara at byrja klokkan 10, og matarsteðgur verður klokkan tólv. Hann plagar at vera í Posthúskjallaranum, men hesu ferð verður hann í hølunum hjá Frelsunarherinum. Hvar sjálvur dagurin verður hildin, er ikki endaliga avgjørt. Vanliga plagar dagurin at verða hildin í Ebenezer.

AD 3 Ymiskt

Fundurin varð hesuferð hildin í stóru høllini í Tilhaldinum. Alt tilfarið frá gamla skrivstovuhølinum er flutt upp í nýggju hølini, men enn er eftir at sortera tað, sum goymast skal, so ein uppruddíng fer fram skjótast tilber.
Tilhaldið er stongt til eftir Ólavsøku.

Næstkomandi fundur er settur at vera hósdagin 25. august 2022. Tá skuldi endaliga skráin fyri Eldradagin helst verið komin endaliga uppá pláss.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Skrivað tann 11. juli 2022

Petur Rouch,
skrivari